


*Sørvágskvinnur vunnu mánakvøldið á TB, men hava brúk fyri stórari hjálp frá øðrum, skal tað eydnast at sleppa framum um Fleyr og fáa pláss í FM-finaluni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# SÍ roynir til tað síðsta

**FLOGBÓLTUR** Hóast nógv hjálp skal fáast frá øðrum, um SÍ-kvinnurnar skulu koma í FM-finalurnar, royna tær at gera sítt til, at tað skal eydnast

**Hilmar Jan Hansen**

Sum nevnt í mánadagsblaðnum, er tað mestsum bara ein teoretiskur møguleiki fyri, at kvinnurnar hjá SÍ kunnu koma í FM-finaluna ímóti Mjølni. SÍ kappast við Fleyr um henda møguleikan, men skal tað eydnast sørvágskvinnum at koma í finaluna, skal hjálp fáast frá øðrum.

Mánakvøldið vann SÍ ein tryggan 3-0 sigur á TB, sum bert megnaði at geva mótstøðu í fyrsta setti, men síðani varð spælt av vøllinum í teimum báðum seinnu. Hetta merkir, at SÍ nú bara er tvey stig aftan fyri Fleyr, ið tók hevur spælt ein dyst færri.

Kappingin nærkast endanum, og SÍ hevur bara tveir útidystir eftir, ið skulu vinnast, skal finalan gerast veruleiki. Tann fyrri verður ímóti grannunum í Drátti og tann seinni ímóti oddaliðnum, Mjølni.

Hinvegin hevur Fleyr tríggjar dystir eftir. Tann fyrsti av teimum verður á heimavølli ímóti Mjølni sunnudagin, og síðani spælir Fleyr heima ímóti Ternuni og úti ímóti TB. Vinnur Fleyr bara ein av hesum dystunum, endar finaluplássið við fullari vissu í Havn, men snávar Fleyr tvær ferðir, samstundis sum SÍ vinnur sínar báðar írestandi dystir, verður settmunurin avgerandi fyri, hvat av liðunum kemur í finaluna.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Eik-ligan kvinnur

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 18 | 16 | 2 | 51 | 11 | 40 | 20 |
| 2 | Fleyr | 18 | 15 | 3 | 48 | 18 | 30 | 19 |
| 3 | SÍ | 19 | 14 | 5 | 46 | 24 | 22 | 17 |
| 4 | ÍF | 18 | 10 | 8 | 35 | 30 | 5 | 12 |
| 5 | TB | 19 | 8 | 11 | 31 | 41 | -10 | 9 |
| 6 | Ternan | 18 | 5 | 13 | 20 | 43 | -23 | 7 |
| 7 | Dráttur | 18 | 2 | 16 | 22 | 50 | -28 | 3 |
| 8 | KÍF | 18 | 3 | 15 | 14 | 50 | -36 | 3 |

**SÍ-TB 3-0** (25-22, 25-12, 25-12)

# Amboðslandslið úttikin

**FIMLEIKUR**
**Sunnudagin var úttøka til landsliðið í amboðsfimleiki hjá monnum, so nú eru bæði kvinnu- og manslandsliðið mannað, men enn er talan um bruttohópar**




*Føroysku fimleikararnir sleppa ikki við til Oyggjaleikirnar á Isle of Wight í summar, tí har er fimleikur ikki á skránni. Í staðin verða alternativir fimleikaoyggjaleikir á Jersey*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hilmar Jan Hansen**

Hóast fimleikarar úr bæði Havnar Fimleikafelag og Støkk vóru møttir til úttøkuna, vóru allir teir sjey úttiknu fimleikararnir úr Havnar Fimleikafelag. Tað speglar aftur støðuna í mansfimleikinum, har fimleikarar úr høvuðsstaðnum vunnu allar steypakappingarnar, sum hava verið higartil í ár.

Teir sjey fimleikararnir, sum eru tiknir út, eru Rósing Dam, Øssur D. Eiriksfoss, Fróði Mortensen, Jóni Christiansen, Bartal Wardum, Pætur Jacobsen og Olivur D. Eiriksfoss. Hetta er sum sagt bruttoúttøka, tí endaliga talið á fimleikarum verður fimm.

Úttøkan til kvinnulandsliðið var longu fyri einum mánaði síðani, tá 10 fimleikarar komu við í bruttohópin. Tær eru Eydna Danielsen, Kristina Toftegaard, Bjarta Jansdóttir, Katrin S. Wardum, Birita Poulsen, Bára Herolvsdóttir Persson, Fríðhild Norðgerð og Herdis Thomsen úr Havnar Fimleikafelag, Annika B. Hansen, Anita S. Davidsen og Durita S. Davidsen úr Støkk, og Eyvør W. Samuelsen úr Ljósinum.

### Leikir á Jersey

Fimleikur er ikki ítróttargrein á Oyggjaleikunum á Isle of Wight í summar, men sum onkuntíð fyrr, hava oyggjasamfeløgini, sum íðka fimleik, alternativar fimleikaoyggjaleikir í staðin, og teir verða hesa ferð á Jersey í døgunum frá 6. til 9. juli. Hetta verður samstundis fyrsta kappingin, úttiknu fimleikararnir hava at síggja fram til, men undan leikunum verður endaligi hópurin skorin niður, so hann tá telur fimm kvinnur og fimm menn.

Venjari hjá kvinnunum er Alida Savina og hjá monnum Valery Savin. Tey bæði eru úr Lettlandi og eru frammanundan venjarar hjá Havnar Fimleikafelag.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Framskundað U17-venjing

**FLOGBÓLTUR** FM-finalurnar flyta venjing til norðurlendska kapping í heyst

**Hilmar Jan Hansen**

Fyrireikingarnar hjá U17-gentulandsliðnum í flogbólti til NEVZA Championships-kappingina, sum verður um mánaðarskiftið september/oktober, eru byrjaðar. Nú leygardagin skulu genturnar, sum eru frá árgangi 1994 til 1996, venja í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn frá klokkan 15.30 til 18.30.

Upprunaliga skuldi venjingin verða leygardagin 27. mars, men av tí at tá er FM-finala í Eikliguni og fleiri av U17-spælarunum kunnu hugsast at vilja stuðla sínum liðum í FM-finalunum, hevur landsliðsvenjarin, Rosa Jacobsen, gjørt av at framskunda venjingina.

NEVZA er stytting fyri »The Northern European Volleyball Zonal Association« og er samstarv millum norska, svenska, finska, danska, íslendska og føroyska flogbóltssambandið, sum hevur verið síðani 2003.

Í løtuni hava føroyingar formansskapin í NEVZA.

*hilmarjan@sosialurin.fo*